Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 01 |
| Tíð: | tann 11.01.2022 klokkan 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu og Býráðssalurin |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, og Petur Rouch, skrivari.

**Fundarskrá:**

1. Fundur við Landsfelag penjónista

<u>AD 1 Fundur við Landsfelag penjónista</u>

Á skránni var fyrireiking til fund við Landsfelag Pensjónista viðvíkjandi Ráðstevnu í Norðurlandahúsinum 15. mars, sum Landsfelag Pensjónista skipar fyri **saman** við Eldraráðum og pensjónistafeløgum úr øllum landinum.

Broytt skrá fyri fundin var gjøgnumgingin og viðmerkingar vóru gjørdar.

Klokkan 13:30 var farið niðan í býráðssalin, har fundurin við Landsfelag Pensjónista varð hildin. Beata Samuelsen og Gunnleyg Durhuus høvdu biðið um fundin. Umframt tær báðar vóru umboð fyri onnur eldraráð og pensjónista feløg møtt. Hesi vóru Alfred Olsen, Ingeborg Vinther, Elna Lamhauge Strøm, Hans Jacob á Kósini og Gunnvør Sigurðson.

Vit høvdu eina góða og gevandi gjøgnumgongd av skránni. Nakrir av luttakarunum eru funnir og hava játtað at luttaka. Nakrir teirra sita í ráðum/feløgum. Vit høvdu ymisk uppskot um tey, sum enn ikki eru funnin at luttaka, og tey verða spurd. Møguliga kunnu koma smávegis broytingar í skránna.

Dagurin byrjar klokkan 10 og endar klokkan 16. Høvi verður at keypa mat.
Dagurin verður nokk so ”stressaður”, og skotið var tí upp at halda uppfylgjandi fundir.

Landsfelag Pensjónista hevði gjørt eitt fyribils yvirlit yvir kostnaðin av degnum, og upphæddin er umleið 70.000. Vit í Eldraráðnum í TK skjóta upp at rinda 35.000 til ráðstevnuna, og fara at seta okkum í samband við TK hesum viðvíkjandi

Skrivað 20. januar 2022

Petur Rouch,
skrivari